7-26 (11-14):

# n burturtveittur




*Tað kostaði Kyndli dýrt, at teir ikki høvdu nóg gott tak á Sámal Joensen. Ferð eftir ferð slapp hann bæði ein og tveir metrar inn um tríggja metra strikuna, og so kundu teir grønu akkurát tað sama sett eitt opið mál til stóra vestmenningin at skjóta í*

## FAKTA UM DYSTIN

**VÍF-Kyndil 27-26 (14-11)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Sámal Joensen 13(1), Ingi Olsen 7(3), Harald Bjørgvin 2, Daniel Rápa 2, Johnny Joensen 2, John Zachariassen 1
**Kyndil:** Jónleif Sólsker 11(8), Høgni Klein 8, Janus Einar Sørensen 4, Hans Áki Dal Christiansen 2, Rókur Akralíð 1
**Brotskøst:** VÍF 4, Kyndil 9
**Útvísingar:** VÍF 10, Kyndil 5
**Diskvalifikatión:** VÍF 1 (3x2 minuttir)
**Dómarar:** Kári Hansen & Dánjal Hansen. Høvdu so als ikki sín besta dag. Linjan var trupul at fylgja, og móti dystarenda megnaðu teir í alt ov lítlan mun at halda høvdinum kalt.

skifti á málmanspostinum, soleiðis at ein sera vælleikandi Eli Müller kom inn at loysa niðurskotna Dejan Lacok av.

### Alt lá til Kyndil

Aftur tóktist dysturin hava tikið eina avgerandi vend, men í løtunum eftir steðgin varð hendan so ruddiliga koppað á. VÍF kom út sum eitt óløgi eftir steðgin. Samstundis hevði Kyndil gloymt alt um stinna verjuspælið, og Sámal Joensen & Co. tóku uttan stórvegis hóvasták av. Fimm tey fyrstu málini eftir stegðin áttu teir á heimaliðnum, og hóast Kyndil raknaði nakað við, so tóktist hetta als ikki vera nóg mikið. Fyrstu 18 minuttirnar eftir steðgin vann VÍF heili 12-4!, og nú lá alt beint til høgra beinið. Ella var tað kanska armin?

Men teir grønu vóru kortini ikki heilt lidnir. Teir fingu fatur um rætta endan, og seigliga togaðu teir seg aftur inn. Lars Black kom eisini inn sum ein sera handugur avloysari hjá Johan í málinum, og knappliga stóð 24-22 á talvuni. Og nú vóru tað teir gulu, sum tóktust febrilskir. At teir so samstundis fingu tvær útvísingar ímóti sær, gjørdi ikki støðuna betri, og sum dysturin nú lagaði seg, bendi alt á ein útisigur. Seks ímóti fýra fekk Kyndil nevnliga skotið seg upp á javnt, og tó at VÍF aftur skoraði, so hildu teir áfram at fáa útvísingar. Jónleif megnaði eisini at skjóta teir framum, og so tóktist alt avgjørt. Ikki minst tí fjórða VÍF-útvísingin innan fýra minuttir samstundis var hin triðja hjá Inga Olsen, sum soleiðis fekk reyða kortið.

### Tveittu stigini burtur

Um onkur av heimaáskoðarunum nú var farin at leita sær móti hurðini, so skal viðkomandi ikki verða sagdur ringur fyri tað. Tí veruleikin var, at alt nú skuldi verið avgjørt. Kyndil hevði ikki bara essini. Teir høvu eisini allar kongarnar og minst tvær damur í hondini, men kortini var tað VÍF, sum onkursvegna trumfaði yvir. Kyndil megnaði ikki at spæla seg fram til seinasta opna møguleikan, og tá VÍF so aftur skoraði tvær ferðir, og Eli so eisini átti seinastu bjargingina í dystinum, var stóð tað greitt. VÍF hevði fyri triðju ferð á rað bast Kyndli. Teir fingu tvey stig afturfyri, og nú eru tað teir, sum eru á odda í landskappingini. Enn eru ikki allar súður syftar, vildi útvarpsmaðurin helst sagt, men í øllum førum eru tað nú vestmenningarnir, sum hava fyrimunin. Ikki minst sálarliga.

Spurningurin er so, um teir megna at halda dampinum. Tað kann í øllum førum tykjast nakað tunt, nú liðið noyðist at vera Áka Olsen fyriuttan í einar fýra-fimm vikur. Hesaferð megnaði Sámal at taka ábyrgdina á seg, men tað er ikki víst, at tað fer at bera á mál hvørja ferð, og so er spurningurin, hvørji onnur vápn vestmenningarnir eiga.

# Idioti

**Hans Áki Dal Christiansen var í øðini um svíðandi tapið, sum Kyndil var fyri sunnudagin**

HONDBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Hatta var idioti. Seinastu løtuna er einki skil á taktikkinum spælskipanini, og tað er for galið. Tað kostar okkum tvey óluksáliga týðandi stig!

Hans Áki Dal Christiansen var snøgt sagt í øðini, tá dysturin móti VÍF var av sunnudagin. Ikki minst iðraði hann seg um, at tað ikki eydnaðist Kyndli at avgera dystin, tá teir í einar fimm minuttir høvdu yvirtalsstøðu móti dystarloki.

– Vit spæla seks móti fýra, og vit klára ikki so mikið sum at spæla verjuna tunna. Tá er okkurt galið. Bæði við spælskiparanum og við beinkinum.

Sipar tú til, at tit tá skuldu tikið tað time-out-'ið, sum tit framvegis áttu eftir.

– Sjálvandi. Vit skulu sláa kalt vatn í blóðið, og klára vit tað ikki sjálvir, so skulu venjararnir gera tað, staðfesti hann.

Kanska hørð orð, men helst eisini søgd í eini stórari frustratión, nú Kyndil triðju ferð á rað var við undirlutan móti arvafíggindunum úr VÍF.

Men sæð yvir ein kamb, so var avrikið hjá Kyndli í dystinum ikki nóg støðugt. Í løtum høvdu teir veruliga takið á VÍF, men løturnar vóru bæði ov fáar og stuttar, fyri at tær veruliga skuldu gera nyttu.

– Men tað er sama søgan, sum ger seg galdandi. Í endaspælinum hevur tað verið alt ov nógv upp og niður hjá okkum. Vit hava snøgt sagt ikki verið nóg góðir, og heldur enn at stríðast saman, so verður skuldin tveitt á aðrar, og tað er ikki nóg gott. Tað er nakað, sum vit mugu broyta her og nú.

Men enn er ikki alt mist. Góði málmunurin ger, at tað við at kalla vissu er nóg mikið, um Kyndil vinnur tað, sum eftir er, og tað ásannaði Hans Áki eisini.

– Sjálvandi er alt ikki mist. Og vit hava enn møguleikan at avgera alt sjálvir. Men vit gjørdu tað nakað nógv truplari við tapinum í dag. Tað svíður eisini, at vit nú tríggjar ferðir á rað hava tapt fyri VÍF, men hava bara ikki verið nóg smartir, staðfesti altso Hans Áki Dal Christiansen at enda.



*– Vit spæla seks móti fýra, og vit klára ikki so mikið sum at spæla verjuna tunna. Tá er okkurt galið*

## Áki er úti allan februar

Tað var ein álvarsligu smeitur, sum VÍF var fyri, tá Áki Olsen noyddist av vølli móti dystarenda seinasta mikudag. Í øllum fagnaðinum um sigurin á Kyndli - og harvið finaluplássinum - varð ikki roknað við, at talan var um nakran álvarsligan skaða, men tað var tað so kortini.

Sunnudagin sást Áki soleiðis ganga millum áskoðararnar til dystin móti Kyndli, og støðan verður helst tann sama í einar fýra til fimm vikur afturat. Eitt brot í beininum undir vinstra eyga hevur við sær, at tað ikki er hugsingur um at spæla fyribils. Møguliga fær skotsterki bakkurin tó verið við seinastu avgerandi dystirnar, men fyri fyrst er ikki nógv annað at gera, enn at hava tol.

**-jm**